# Vøksturin er steðgaður upp

**Stjórin fyri Føroya Tele sigur seg kunna staðfesta, at vøksturin hjá fyritøkuni er steðgaður í ár. Samanlagt stendur væl til hjá fyritøkuni, men ansast skal væl eftir í framtíðini, heldur Andras Róin**

FJARSKIFTI
*Heri á Rógvi*




Føroya Tele almannakunngjørdi herfyri roknskapin hjá ársfrágreiðingina hjá fyritøkuni.

À føroyska fjarskiftismarknaðinum er Føroya Tele framvegis ein risi, hóast kappingin hevur sett síni spor.

Føroya Tele eigur í dag gott áttati prosent av fastnetkundunum í Føroyum, og Føroya Tele situr eisini á ein stórum parti av GSM marknaðinum, sum hevur kastað serstakliga nógv av sær.

Føroya Tele er harumframt virkið á øðrum økjum, eitt nú hevur fyritøkan góðar áttatúsund internetfelagar og í desember í fjør byrjaði dóttirfyritøkan Televarpið sítt virksemi.

Og stjórin letur væl at støðuni.

– Vit eru væl fyri í dag. Síðstu árini hava givið eitt gott úrslit. Solideturin hjá okkum er betri enn flestu fjarskiftisfyritøkur í okkara grannalondum, sigur Andras Róin.

2002 gav Føroya Tele eftir skatt 53,5 mió. í yvirskoti. Hetta er tað besta árið hjá fyritøkuni nakrantíð.

Andras nevnir eina av høvuðsorsøkunum til, at tað hevur gingið so mikið væl, at teir eru slopnir undan skeivum íløgum í nýggja tøknifrøði, eitt nú í sambandi við fartelefoni. Umfram stórri uttanlands ævintýr, sum fleiri fjarskiftisfyritøkur uttanlands hava mist nógv uppá.

– Politikkurin hjá okkum er tann, at vit fylgja væl við fyri at finna útav, hvussu tann nýggja tøknifrøðin klárar seg, heldur enn at loypa út í tað. Tá so taka støðu til at gera íløgur í nýggja tøknifrøði royna vit virka skjótt, sigur Andras Róin.

Gongdin higartil í ár hevur tó ikki verið eins góð sum í fjør, og í ársfrágreiðingini hjá fyritøkuni verður sagt, at roknað verður ikki við einum eins góðum úrsliti fyri 2003 sum fyri 2002.

– Teir síðstu mánaðirnar í fjør og teir fyrstu mánaðirnar í ár hava vit merkt, at vøksturin er steðgaður upp, sigur Andras Róin.

Hann metir, at hetta skyldast deils kappingini og tað, at ikki so nógv ferð er á búskapinum í Føroyum longur.

## Kapping

Tann sokallaða frælsisgerðingin av fjarskiftismarknaðinum í Føroyum hevur merkt Føroya Tele nógv. Fyriuttan smærri fyritøkur á ávísum økjum, so er tað serliga Kall, ið bjóðar Føroya Tele av.

Við góða úrsltinum hjá Føroya Tele í huga er tað so ikki pláss fyri tveimum fyritøkum á marknaðinum í Føroyum?

– Mín persónliga hugsan er tann, at vit mugu ansa sera væl eftir. Vit síggja í Danmark, at tað bara eru tvær fyritøkur, ið klára seg, og hinar nógvar pengar, sigur Andras Róin.

Stjórin í Føroya Tele heldur, at tað kann skjótt gerast vandamikið, um kappast verður ov nógv um prísir – heldur enn tænastur og annað.

– Fer kappingin at snúgva seg bert um prísir, so verður tað ein spurningur um, hvør eigur flest pengar á bók.

Vit mugu eisini hugsa um, hvat er best fyri samfelagsbúskapin. Vit hava gjørt eina avtalu við Kall, um at teir nýta okkara GSM net, har teirra ikki røkkur, og tað meta vit eisini vera neyðugt, tí vit høvdu í síðsta enda kunna sitið eftir við rokningini, um tað ikki hevði borið við tveimum kervum, sigur Andras Róin. Men Andras Róin er langt

*–Teir síðstu mánaðirnar í fjør og teir fyrstu mánaðirnar í ár hava vit merkt, at vøksturin er steðgaður upp, sigur Andras Róin.*

frá nøgdur við tey boð, Føroya Tele fær frá Fjarskiftiseftirlitnum.

– Vit fáa at vita, at vit skulu tapa marknaðarpartar – at vit eru ov góðir, og tískil mugu vit finna nýggj virkisøki, har vit eisini ætla okkum at miðja ímóti útflutningi, sigur Andras Róin.

## Privatisera

Aftur í ársfrágreðingini verður mælt til, at Føroya Tele verður privatiserað, og hetta hevur leiðslan í Føroya Tele eisini hildið upp á í longri tíð.

Men hví er tað so týdningarmikið, at Føroya Tele verður einskilt, tá tað jú gongur frálíka væl sum er?

– Tú hevur rætt í, at vit í prinsippinum klára okkum væl sum er, men vit halda, at Føroya Tele eigur at verða privatiserað. Tað eru fleiri orsøkir til, at Føroya Tele eigur at verða privatiserað. Ein av orsøkunum er, at tað er ikki greiður skilnaður millum eigara og myndugleika. Tað er tann sami landsstýrismaður, sum umboðar eigaran av Føroya Tele og sum skal hava eftirlit við okkum, sigur Andras Róin.

Hann nevnir hesa orsøkina sum eitt dømi, og hann heldur, at tað eru fleiri orsøkir til, at einskiljing eigur at fara fram.

– Samanlagt er støðan óhaldbar sum hon er. Sum støðan er nú kappast vit sum almenn fyritøka við eina aðra fyritøka, har Framtaksgrunnurin er høvuðspartaeigari, og tað halda vit ikki gongur í longdini, sigur Andras Róin.

Sambært Andras Róin er Føroya Tele til reiðar at verða einskilt. Hansara áskoðan er tann, at einskiljingin skal fara fram í stigum, har tey fyrstu tjúgu prosentini verða seld til starvsfólk og føroyskar íleggjarar. Bíðað eigur at verða nøkur ár, áðrenn meirlutin av fyritøkuni verður seldur.

Virðið á Føroya Tele er torført at staðfesta, og Andras Róin metir, at virðið er á leið millum eina hálva og hálvaaðru milliard.

## Kervi

Kunngjørt varð herfyri, at Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, hevur sett ein arbeiðsbólk at finna útav, um og hvussu Føroya Tele kann skipast eftir eina einskiljing.

Tað er serliga spurningurin um kervi, sum Føroya Tele umsitur – hvørt hetta skal skipast í eitt felag fyri seg.

Andras Róin hevur áður greitt meldað út, at hann ikki heldur hetta vera nakra góða loysn.

Sum er hevur Føroya Tele eina veitingarskyldu, og Andras Róin hevur torført við at síggja, hvussu ein kervispartur, sum ikki vinnur pening, kann røkja uppgávurnar til fulnar.

– Vit vóna, at mann ikki finnur alt ov heimabundnar føroyskar loysnir, har nakað verður sett í verk, sum eingin annar nakrantíð hevur gjørt, sigur Andras Róin.

Hann leggur afturat, at teir hava einki ímóti, at kervisparturin verður lagdur í eina dóttirfyritøku undir einari konsern.

Men Føroya Tele vinnur langt frá pening upp á smærru økinum í Føroyum.

– Vit hava akspeterað okkara støðu við veitingarskyldu, og tað haldi eg ikki, at politikararnir skulu vera bangnir fyri. Men vit vinna bara pening av teimum stóru økjunum í Føroyum, sigur Andras Róin.

Økið sum Mykines, Fugloy og eisini størri øki eru ein beinleiðis útreiðsla hjá Føroya Tele, men hetta er partur av veitingarskylduni í loyvinum hjá Føroya Tele.

Televarpið:

# Einki DR í bræði – men Viasat

**Televarpið hevur umskipað sínar programpakkar fyri at gera pláss til TV3. DR er tikið heilt av skránni**

SJÒNVARP
*Heri á Rógvi*

Televarpið hevur nú almannakunngjørt teirra nýggju pakkar og prísir.

Televarpið bjóðar nú fýra grundpakkar og ein Canal+ pakka.

Grundpakkarnar eru ymiskir í prísi og tali av rásum. Tann bíligasti kostar 129 kr. um mánaðin og hin dýrasti fæst fyri 269 kr. um mánaðin. Canal+ pakkin kostar 209 kr. afturat grundpakkanum.

Ein munur er serliga fleiri Viasat rásir eru tiknar við. Her er talan um TV3, 3+, Viasat Sport, Viasat Action, Viasat Nature og Viasat Explorer.

Hesar rásir eru umfataðar í tveimum av grundpakkunum.

Tann heilt stóri grundpakkin við 24 rásum – íroknað SvF –kostar 269 kr. um mánaðin.

DR1 og DR2 og Rás1 eru tiknar av skránni saman við Eurosport News og VH1 Classic.

Nevndarformaðurin fyri Televarpið, Andras Róin, sigur, at orsøkin til, at Televarpið ikki kann bjóða DR skyldast ógreiðum viðurskiftum internt hjá DR.

– Vit hava ikki megnað at forhandla eina avtalu upp á pláss við Danmarks Radio. Teir eru ikki klárir til at gera eina tílíka avtalu, og vit sostatt ikki gjørt nakað, sigur Andras Róin.



# Dario Fo í Sjónleikarahúsinum

**Leygarkvøldið klokkan 19 verður sjónleikurin »Einki er sum mammusa gras« frumsýndur í Sjónleikarahúsinum í Havn. Leikurin er skrivaður av italiumanninum Dario Fo**



*Havnar Sjónleikarafelag frumframførir leygardagin leikin »Einki er sum mammusa gras« eftir italiumanninum Dario Fo*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

SJÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

Havnar Sjónleikarafelag hevur síðani fyrst í februar mánaði vant leikin »Einki er sum mammusa gras« eftir italiumanninum Dario Fo. Og nú er klárt. Í annaðkvøld, leygarkvøldið, verður leikurin frumframførdur.

– Leikurin er ein politiskur skemtileikur. Eitt sindur av eini satiru, men tú kanst ikki kalla tað fyri eina farsu, og er tað tað, sum ger hann sermerktan, sigur leikstjórin, Jákup Veyhe.

Sjey leikarar spæla við, og teir flestu eru royndir sjónleikarar. Ein teirra fer á sjónleikaraskúla í næstum, so onkur av teimum er væl á veg til at gerast yrkissjónleikari.

– Vit byrjaðu fyrst í februar mánaði við einum skeiði um Dario Fo, sum Marita Dalsgaard helt. Vit hava eisini fingið hjálp frá einum italiumanni, Gianfranco, sum býr her í Føroyum, at hjálpa okkum við teimum italiensku viðurskiftunum, greiðir leikstjórin frá.

## Søgugongdin

Leikurin gongur fyri seg í Milano í Italia. Í eini íbúð býr ein familja – abbi, mamma og ein sonur.

Ein dagin tá sonurin kemur heim, uppdagar hann, at abbin og mamman hava roykt hash, og seinni finnur hann útav, at tey ikki bara roykja hash, men tey selja eisini hash. Tey hava eina hashplantasju í íbúðini.

Sonurin leggur ikki so nógv í, um hann og vinirnir roykja, men hann vil ikki hava, at abbin og mamman roykja hash.

Eitt systkinabarn, sum er politistur, kemur ein dagin at vitja. Hann arbeiðir við rúsevnismálum, og skal finna seljarar.

Tey klára at sannføra systkinabarnið um, at hashið er kryddurtir og kál, og fáa hann at eta av tí. Harafturat fáa tey sannført hann um, at tey eru hægri í tign enn hann innanfyri politiheimin.

– Leikurin er ógvuliga politiskur. Allir leiklutirnir eru politiskir, og hevur hetta verið ógvuliga stuttligt at arbeiða við. Leikurin gongur fyri seg í 70 árunum í Italia, og samfelagið spenti so vítt tá. Á aðru síðuni hevði tú kommunistar og á hinari fasistar. Høvundurin er heilt vinstravendur, og tað leggur hann ikki lok á í leikinum, sigur Jákup Veyhe.

Leikstjórin sigur, at tað hevur gingið væl at vant. Nógv er altíð at halda skil á uppundir ein sjónleik, men síðani sunnudagin er leikurin vorðin sældur ígjøgnum.

– Fólk kunnu bara koma at síggja. Eg vænti tey fara at hugna sær og flenna nógv, tí tað er tað lagt upp til. Men tey kunnu bara døma sjálvi.

Leikurin er góðan hálvan annan tíma til longdar, og verður frumframførdur í Sjónleikarahúsinum í Havn leygardagin klokkan 19.00.



*Leikurin er ein politiskur skemtileikur, sum ikki dylir, at leiklutirnir eru ógvuliga politiskt tilvitaðir*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Ungdómssamfelagsmøtir í Ebenezer

UNGDÓMSMØTI
*Samkoman í Ebenezer*

Í fleiri ár hevur verið skipað fyri ungdómssamfelagsmøtum í Ebenezer í Tórshavn. Hesi møtir hava verið væl vitjað av ungum úr øllum landinum. Í fjør vóru umleið 500 ungfólk við til møtini.

Í ár verða møtini í døgunum 27.- 30. mars. Á skránni fyri møtirøðina er talur, felagssangur, ungdómskór, solosangur o.a.

**Møtini verða:**

Hóskvøldið og fríggjakvøldið kl. 20.00, leygarkvøldið kl. 21.00 og sunnukvøldið kl. 17.00.

Fríggjakvøldið kl. 22.00 og leygarkvøldið kl. 21.00 verður møti og opið hús.

Leygardagin kl. 15.00 og kl. 16.30 verður bíbliuseminar.

Temaði á møtunum er Trúgv.

»Trúgv er full vissa um tað, sum vónað verður, sannføring um tað, sum ikki sæst.« Hebr. 11,1.

Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møtir, sigur Samkoman í Ebenezer í tíðindaskrivi. Meira er at lesa um Ebenezer á www.ebenezer.fo

